UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **23. oktober 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-90**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 30/2020 frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, eftir tingskipanini §52 a. Fyrispurningur um vaksnamannaútbúgvingarskipan, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu gongur við at gera og seta í verk lóg um vaksnamannalæru í Føroyum og at menna skipanina annars?
2. Hvussu skipa vit okkum innan vaksnamannalæru, so at vit koma á hædd við støðið í Norðanlondum innan hetta øki?
3. Hvussu verður tryggjað, at allir samfelagsgeirar, sum ávirka vaksnamannalæru eru við í tilgongdini og tryggja, at Føroyar fáa eina vælvirkandi skipan fyri eitt samfelag sum okkara?

Svar

Til 1: Arbeitt verður við vaksnamannaútbúgving á ymsan hátt. Við støði í lógini um førleikameting frá 2014 og kunngerðini frá 2018 er møguligt hjá vaksnum, sum ynskja sær prógv innan yrkið, tey arbeiða í, at verða førleikamett, og á tann hátt fáa stytt um útbúgvingartíðina. Førleikameting er gjørd innan skrivstovuyrkið, og í løtuni verður arbeitt við at fáa skipað fyrstu førleikametingarnar innan timburútbúgving. Harumframt verður serlig skipan gjørd fyri undirvísing í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum fyri tilflytarum.

Til 2: Sum liður í førleikamenningini er sett á stovn ein vegleiðingarstova, sum skal veita teimum vegleiðing, sum ynskja at fáa styrkt sína støðu á arbeiðsmarknaðinum, við m.a. at fáa kunnleika um teir møguleikar, sum finnast í dag. Tætt samstarv er í millum vegleiðingina, skúlar og útbúgvingarstovnar og arbeiðsmarknaðarpartarnar til tess at menna møguleikarnar fyri bæði førleikameting og førleikamenning.

Vaksin og tilkomin hava møguleika at taka útbúgving og førleikamenna seg á vinnu- og miðnámsskúlunum og á Fróðskaparsetrinum. Sum dømi kunnu nevnast á fyrireikingarbreytini, á

Heilsuskúlanum, á Miðnámi í Vestmanna, sum skipar fyri ferðaleiðaraskeiði og á hægri námi á Glasi. Harumframt eru fleiri tilboð innan frítíðarundirvísing við atliti at undirvísing í føroyskum fyri tilflytarum, stakgreinalestri á miðnámsstigi, skeiðum innan sigling og landbúnað og lærugreinum á 10. floksstigi.

Fyri at koma á hædd við støðið í Norðurlondum er tørvur á miðvíst og framhaldandi at menna skipanina við førleikameting og førleikamenning.

Til 3: Týdningarmikið er, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum og útbúgvingarverkið saman við viðkomandi myndugleikum samstarva um at tryggja, at allir viðkomandi partar eru við í tilgongdini at skipa økið. Umráðandi er, tá ið farið verður undir at gera eina lóg um vaksnamannalæru, at hetta verður gjørt í tøttum samstarvi millum bæði arbeiðsgevarar, fakfeløg og almennar stovnar, sum í dag arbeiða við fólkum, ið hava tørv á ella ynskja at menna seg og fáa sínar førleikar dagførdar.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður